

*Hetta er myndin hjá Helga Winther Olsen, sum vann fyrstu virðisløn. Í Grundgevingunum sigur dómsnevndin, at Myndin er fyrst og fremst avbera vøkur, og hóast hon er tikin undir sjónum, er góðskan sera góð. Við at avmynda eina bertáknu, ið livir í sjónum, og bert er fáar sentimetur til støddar, so opnast ein heimur, ið er fremmandur fyri flestu okkara. Og hóast bertáknan er í brennideplinum, hevur myndamaðurin megnað at fanga eina rúgvu av øðrum livandi verum. Sanniliga lívfrøðiligt fjølbroytni!*

# Gløgg eygu fingu vinningar

Nú 2010 er ár fyri lívfrøðiligt fjølbroytni, hava Lívfrøðingafelagið og Miðlahúsið skipað fyri myndakapping og eini skúlakapping við endamálinum at lýsa lívfrøðiligt fjølbroytni í føroysku náttúruni.

Nógvar myndir, tekningar, kollasjur og frágreiðingar komu inn og seinnapartin fríggjadagin fekk Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, heiðurin at handa vinnarunum virðislønirnar fyri avrikið.

Landsstýriskvinnan fegnaðist um kappingina, ikki minst skúlakappingina, har børn sluppu at royna hugflogið at lýsa, hvat lívfrøðiligt fjølbroytni er.

Hon helt at tað nettupp er barnið, sum hevur eyga fyri nátturuni og smálutum í henni og hon vónaði, at hetta fer at vekja áhugan og sjónarringin fyri náttúruni.

Og hon helt eisini, at myndirnar, kollasjurnar og frágreiðingarnar, sum eru komnar inn, vísa, at eyga er ógvuliga gløgt.

Í skúlakappingini var tað 2. klassi á Strondum, sum vann kappingina fyri tey yngstu skúlabørnini í 1.-3. klassa. Fyri miðdeildina í fólkaskúlanum, sum fevndi um 4. og 5. klassa, var tað 5. A á Tvøroyri vann kappingina. Og tað var 7. klassi á Toftum vann kappingina fyri tey eldru skúlabørnini, ið var fyri børn í 6. og 7. klassa.

Teir tríggir klassarnir, sum vunnu, fingu ein kekk upp á 10.000 krónur ípart.

Í myndakappingini fekk Helgi Winther Olsen fyrstu virðisløn, sum var eitt myndatól. Hanus Bergsson vann 2. virðisløn, sum var eitt myndatól, sum Expert hevði latið og triðja virðisløn var ein eksternur harðdiskur frá City, umframt 1500 krónur.

Undir teiginum Myndafrásagnir á Portalinum eru tvær myndafrásagnir um kappingina og um tiltakið í Miðlahúsinum nú seinnapartin, har vinningarnir vórðu lætnir. Har eru eisini nógvar av myndunum at síggja.

Myndirnar frá tiltakinum í Miðlahúsinum, hevur Jens Kr. Vang tikið.

